## Uppsøgn hóttir svenskt felag

Tað kann koma at kosta svenska fótbóltsfelagnum, IFK Norrköping, sera dýrt, at felagið hevur koyrt venjaran, Mats Jingblad. Hann stendur á lønarlistanum hjá felagnum til og við desember 2011, og bara tað kann kosta felagnum 2,5 milliónir svenskar krónur. Harumframt hevur hann rætt til eina íbúð í miðbýnum í Norrköping til og við 30. juni í ár, umframt at hann fram til 22. november í ár kann brúka tænastubil og fartelefon, sum felagið rindar fyri.



## Fótbóltsfundur um Felags Stev

Í kvøld klokkan 19 hittast formenn, høvuðsvenjarar og liðformenn í Vodafonedeildini í niðastu hæddini í FSF-húsinum til fundin Felags Stev. Har verður greitt frá Stevnuni 2009, nýggjum í lógunum, umframt um venjaran, liðformannin og dómaran. Helst møta øll tey, sum skulu, tí um ikki venjari ella hjálparvenjari saman við liðformanni ella eyka liðformanni møta, kann felagið fáa 3.000 krónur í bót…

# Sær svart út hjá AaB

**Líkt er til, at norðurjútska fótbóltsævintýrið fer at enda á hesum sinni. AaB tapti uppiborið 2-0 ímóti Manchester City.**

UEFA CUP

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Manchester City megnaði at skora tvær ferðir og fekk hildið AaB frá at fáa mál. Tað ger uppgávuna uppaftur torførari hjá AaB, tá City kemur á vitjan í Aalborg um eina viku*

*Mynd: AFP*

Danska superliga-liðið AaB megnaði ikki at skora eitt týdningarmikið útivallarmál á City of Manchester-leikvøllinum í gjárkvøldið. Tað megnaði mótstøðuliðið tvær ferðir, og tí er líkt til, at fótbóltsævintýrið hjá AaB fær ein enda á hesum sinni.

Longu, tá átta minuttir vóru farnir av dystinum, leyp skriðan. Craig Bellamy sat uttanfyri hjá Manchester City, orsakað av skaða. Í hansara stað spældi Felipe Caicedo, og hann sendi boð út til venjaran, at hann er verdur at satsa uppá. Caicedo setti Michael Jakobsen hjá AaB av, og útplaseraði síðani AaB-málverjan, Karim Zaza, og sigurskósin var sett hjá ensku millióningunum.

### AaB vaknaði

Eftir leiðslumálið vaknaði AaB og kom til nakrar rættiliga stórar málmøguleikar, men uttan neyðuga neyvleikan framman fyri City-málinum. Serliga Andreas Johansson og Caca tóku ikki av møguleikunum.

Ístaðin var tað heimaliðið, sum gjørdi bart, tá Shaun Wright-Phillips økti til 2-0. Wright-Phillips fintaði Patrick Kristensen við brotsteigarmarkið, og so kundi hann senda eitt kanónskot í handara hornið, uttan ein livandi møguleika hjá Karim Zaza at bjarga.

Minuttin aftaná hevði liðskiparin hjá AaB, Thomas Augustinussen ein risamøguleika fyri at toga lið sítt inn aftur í dystin. Augustinussen fekk bóltin sendandi, og var hann púra leysur framman fyri málinum. Men skotið hjá honum fór beint uttanfyri.

City hevði eisini møguleikar til økja um leiðsluna, men Karim Zaza í AaB-málinum vardi væl.

### Vóru nøgdir

Seinni hálvleikur var rættiliga nógv merktur av, at Manchester City-spælararnir vóru nøgdir við 2-0 leiðsluna, teir høvdu vunnið sær í fyrra hálvleiki. AaB royndi at koma longur fram á vøllin í seinna hálvleiki, men gjørdust kortini ikki spælstýrandi liðið í dystinum.

Bæði liðini høvdu nakrar stórar møguleikar, serliga Shaun Wright-Phillips hevði ein risamøguleika, men aftur bjargaði Karim Zaza meistarliga.

Eitt 2-0 tap ger tað veruliga torført hjá AaB at koma víðari. Hinvegin, so hevur danska liðið alt at vinna, og einki at tapa. Og í Aalborg er bólturin eisini rundur…

## UEFA Cup-úrslit

Manchester City-AaB 2-0 (2-0)
1-0 Felipe Caicedo, 8.
2-0 Shaun Wright-Phillips, 30.

CSKA Moskva-Shaktar Donetsk 1-0 (0-0)
1-0 Vagner Love (brotsspark), 50.

Dynamo Kiev-Metalist Kharkov 1-0 (0-0)
1-0 Ognjen Vukojevic, 54.

Hamburger SV-Galatasaray 1-1 (0-1)
0-1 Ayhan Akman, 33.
1-1 Marcell Jansen, 50.

Paris SG-Braga 0-0

Werder Bremen-St. Etienne 1-0 (1-0)
1-0 Naldo, 20.

Marseille-Ajax Amsterdam 2-1 (2-1)
1-0 Benoit Cheyrou, 19.
2-0 Mamadou Niang, 33.
2-1 Luiz Suarez (brotsspark), 36.

Udinese-Zenit Sankta Pætursborg 2-0 (0-0)
1-0 Fabio Quagliarella, 85.
2-0 Antonio Di Natale (brotsspark), 90.

# KÍ-kappingin um vikuskiftið

**EB/Streymur, HB og B36 og KÍ eru tey fýra liðini, sum manna ársins kapping í Klaksvík, sum verður leygardagin og sunnudagin.**

FÓTBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Stóra árið í fjør hjá EB/Streymi byrjaði í Klaksvík, tá liðið vann KÍ-kappingina, og síðani hugdu teir bláu og svørtu ikki aftur um seg, men vunnu bæði Løgmanssteypið og føroyameistaraheitið, umframt at teir gjørdu ein góðan innsats ímóti Manchester City í UEFA Cup-kappingini.

Tað er ikki altíð, at vinnarin í KÍ-kappingini fær eitt so gott kappingarár, men kappingin plagar at geva nakrar av fyrstu ábendingunum um, hvussu nøkur av fremru liðunum eru fyri.

Í øllum førum ber til at síggja tey bæði fremstu liðini í fjør, EB/Streym og HB, spæla fyrra innleiðandi dystin í kappingini í morgin klokkan 13, og klokkan 15 fara so vertirnir í KÍ og tapandi steypafinalistarnir í fjør, B36, á vøllin.

Tapararnir í hesum báðum dystunum møtast so í dystinum um triðjaplássið sunnudagin klokkan 13, og sjálv finalan verður sunnudagin klokkan 15.

Sum skilst, ætlar KÍ at gera eitt sindur burturúr uttan fyri vøllin eisini, so sum at skipa fyri kjaki um aktuel og viðkomandi fótbóltsevni.